Til **læraran**

Sum rótskot - uppgávur



Marjun Syderbø Kjelnæs

Sum rótskot

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2020

Nám 2020
Rannvá Hansen, Gunvá Magnussen og Lis G. í Jákupsstovu

Um bókina

Ungdómsskaldsøgan *Sum rótskot* kom út í 2020. Tey fýra, Fríða, Miriam, Pax og Steffan, stríðast á hvør sín hátt og saman um at fáa gerandisdagin at hanga saman og at tora at trúgva upp á framtíðina. Bókin snýr seg um at vera ung í einum stórum og fløktum heimi, og hon viðgerð nógv evni, sum eru viðkomandi fyri tey ungu.

Uppgávurnar til *Sum rótskot* eru ætlaðar næmingum í 8. – 10. flokki.

Uppgávur og arbeiðsgongd

Uppgávurnar eru bygdar upp eftir leistinum áðrenn tit lesa, meðan tit lesa og tá ið tit hava lisið. Uppgávurnar eru skipaðar bæði sum einstaklingauppgávur, makkarauppgávur og bólkauppgávur.

Poddvarpið og útvarpssendingin *Summartímin*, sum eru nevnd í uppgávunum eru á snar.fo, har bókmentauppgávurnar eisini eru.

©Nám

Førleikamál

Uppgávurnar og arbeiðshátturin nema serliga við hesi førleikamál úr námsætlanini.

Talaða málið

- *at nýta talumálið skilliga og málsliga rætt í t.d. kjaki, samrøðu og framløgu*

Skrivaða málið

- *grundleggjandi greining og tulking av eini skaldsøgu, umframt at seta tekst í frásjón*
- *at skriva frásøgukent, gera viðmerkingar og grundgeva*
- *at orða seg málsliga rætt og greitt í ymiskum málsligum stíllegum við fjølbroyttum orðatilfeingi*
- *at nýta orðabøkur, rættstavara og leitiskipanir á teldu*

Samansettir tekstir

- *grundleggjandi greining og tulking av ymiskum samansettum tekstum*

Málkunnleiki

- *at vísa á grundleggjandi innlit í føroysku málskipanina.*

Um rithøvundin

Marjun Syderbø Kjelnæs er fødd í 1974. Hon er uppvaksin og býr í Havn. Hon tók studentsprógv í 1993 og var útbúgvin sjúkrasystir í 1998, men seinastu nógvu árini hevur hon mest arbeitt sum rithøvundur. Hon hevur skrivað bæði stuttsøgur, yrkingar, barnabøkur, skaldsøgur og leikir. Í 2009 fekk hon 3 ára starvsløn úr Mentanargrunni landsins. Í 2011 vann hon norðurlendsku barnabókavirðisløninа fyri skaldsøguna *Skriva í sandin*. *Skriva í sandin* er týdd til bæði danskt og norskt. Í 2008 vann Marjun Barnabókavirðsløn Tórshavnar býráðs. Harumframt hevur hon fingið gávugóðs úr Grunni Thorvald Poulsens av Steinum. Frá 2004 til 2010 var Marjun nevndarlimur í rithøvundafelagnum.

©Nám

Áðrenn tit lesa

Flokspræt:

Hyggið at permuni. Hvør hevur skrivað skaldsøguna? Kenna tit Marjuna? Hava tit lisið nakað annað, sum hon hevur skrivað?

Næmingarnir kunnu arbeiða saman tveir og tveir:

Hvussu eitur skaldsøgan? Hvat er eitt rótskot? Hyggið í Sprotan.

Sprotin: Rótskot*: (bíbl.) rótsproti, koma skal rótskot Ísais*

Marjun sigur sjálv í poddvarpinum á snar.fo, *at eitt rótskot er ein spíri, sum toyggir seg upp undan moldini úr rótini frá einum øðrum træi. Altso, tað er ein lítil vøkstur, sum kemur upp úr einum størri vøkstri, men sum noyðist at liva í skugganum av tí stóra trænum, inntil tað ein dag fellur. Og ikki fyrr enn tá sleppur tað at vaksa frítt.* Hon vísir eisini til Esaias 53,2, har tað stendur, at "*Hann rann upp sum veik planta fyri ásjón Hansara, sum rótskot úr turrari jørð*;".

Flokspræt:

Hvussu er perman prýdd? Man tað siga nakað um, hvat skaldsøgan fer at snúgva seg um?

At leggja til merkis:

- Bókstavirnir eru vøkstur og gróður
- Ó'ið er ein mynd av heiminum
- O'ið er formað sum eitt hjarta
- Pappírið sær út sum endurnýtslupappír
- Navnið á rithøvundinum sær út sum, at tað er skrivað við handskrift

Lesið baksíðutekstin um bókina: *Hvat gert tú, tá fólk látast sum einki, meðan heimurin verður týndur? Og hvat gert tú, tá ein sjúka hóttir við at taka tínu bestu vinkonu frá tær? Tú hugsar kanska sum Pax: hygg her, eg eri 16 ár, ókey, chill, men tá tú veruliga,* ***veruliga*** *hevur fingið nokk av bullshittinum? Hvat tá?*

Hugsið og tosið um hetta – hetta kunnu tit ikki vita, so tit mugu gita:

- á hvønn hátt man heimurin verða týndur?
- hvør sjúka kann talan vera um?
- hvat man "bullshittið" vera fyri nakað?

Lesið eisini tey fýra bókaummælini. Tvey eru innan fyri permuna, og tvey eru á baksíðuni.

©Nám

Meðan tit lesa

Meðan tit lesa *Sum rótskot*, skulu tit minnast til at hava okkurt at skriva á hjá tykkum. Tit skulu leggja til merkis og skriva tað, sum tykkara bólkur er biðin um at gera.

Bólkaarbeiði

Bólkur 1: Eltið Fríðu, skrivið stikkorð, meðan lisið verður. Lýsið Fríðu.

Greiðið síðan frá sambandinum millum Fríðu og familjuna.

Bólkur 2: Eltið Miriam, skrivið stikkorð, meðan lisið verður. Lýsið Miriam.

Greiðið síðan frá sambandinum millum Miriam og Fríðu.

Bólkur 3: Eltið Steffan, skrivið stikkorð, meðan lisið verður. Lýsið Steffan.

Greiðið síðan frá sambandinum millum Miriam, Steffan og foreldrini.

Bólkur 4: Eltið Pax, skrivið stikkorð, meðan lisið verður. Lýsið Pax.

Greiðið síðan frá sambandinum millum Pax og Miriam og sambandinum millum Pax og Fríðu.

Flokspræt:

Gev næmingunum 2 minuttir at tosa saman tveir og tveir, har teir gera eina yvirskrift, sum hóskar til kapittulin. Hetta verður gjørt eftir hvønn kapittul.

1. kap.: Leggið til merkis, hvussu kapittulin byrjar, og hvussu hann endar. Hvat bindur kapittulin saman? Hvussu skilja tit endan?

2. kap.: Tosið um, hvussu samanberingar og myndamál síggjast í kapitlinum.

3. kap.: Tosið um fyrsta reglubrotið á s. 15. Er hetta nakað, næmingarnir kenna seg aftur í?

4. kap.: Hvar eru vit stødd í byrjanini av kapitlinum? Steffan er reyði riddarin. Tosið um tað, og hvussu hann verður samanborin við Jósef.

5. kap.: Tosið eitt sindur um familjuviðurskiftini hjá Fríðu og teimum.

6. kap.: Lesið endan á s. 30. Hvat "alt" ivast Fríða í, um Steffan hevur fortalt pápa sínum?

7. kap.: s. 34 *Eg fortaldi henni alt*. Hvat alt man Fríða fortelja fyri Miriam?

8. kap.: Endin minnir um okkurt á s. 16. Tosið um tað.

©Nám

9. kap.: Tosið um Gretu Thunberg. Hvat vita næmingarnir um hana? Tit finna nógv um Gretu Thunberg á netinum.

10. kap.: Hví man Fríða hugsa soleiðis? s. 39 *Men Miriam er ongantíð einsamøll, mamman fer at verða sitandi og halda vakt yvir henni. Fer at syrgja fyri, at hon fær frið, kanska serliga fyri mær*.

11. kap.: Tosið um, hvat ein matryoshkadukka er. Hvønn týdning hava hesar dukkurnar á s. 45? Tosið meira um familjuviðurskiftini hjá Fríðu og teimum.

12. kap.: Tosið um ferðina hjá DiCaprio og hansara upplivingar. Hvør er boðskapurin her?

13. kap.: Hvussu er sambandið millum Fríðu og Steffan?

14. kap.: Hvat sipar Fríða til, tá hon á s. 53 sigur: *Eg havi grátið nokk um mínar særdu kenslur, um babba, um einsemið, um fokking tápuligar misskiljingar*? Hví og hvussu roynir Fríða at bjarga Steffani á s. 55?

15. - 17. kap.: Tosið um Pax og pápa Fríðu. Á hvønn hátt samanber Fríða pápa sín við Pax?

18. kap.: Tosið um jarnketuna og ættarbandið. Tosið um standmyndirnar.

19. – 21. kap.: Tosið um, hvussu Pax kom við í veðurlagsætlanirnar hjá Fríðu og Miriam.

22. -23. kap.: Tosið um sambandið millum Miriam og Pax. Pax In Terra s. 75. Hvat merkir tað, og hvønn týdning hevur tað í kapitlinum?

24. kap.: Hvat ger mamma Fríðu, sum vísir, at hon hugsar um umhvørvið?

25. kap.: Tosið um, hvat tit halda, at Fríða og vinfólkini hava gjørt.

26. kap.: Tosið um, hvat ymisk menniskju hava gjørt fyri at berjast ímóti órættvísi. Nøkur eru nevnd í kapitlinum, men onnur dømi eru eisini.

27. kap.: Nógv hendir í hesum kapitlinum. Tosið um, hvat hæddarpunktið man vera.

28. kap.: Samsvara ætlanirnar hjá vinfólkunum við tað, tit gittu út frá 25. kap. Kannið, hvat Pax meinar við, tá ið hann í endanum sigur, at hann bara er við uppá Banksy-partin.

29. kap.: Hví eitur hesin parturin í loggbókini Mary og Nóa? Tosið um, hvussu ymisk sjónarmið pápin og Miriam hava.

30. kap.: Hvat man Pax teska Miriam?

©Nám

31. kap.: Finnið onkra samanbering við tað, sum stendur niðarlaga á s. 16.

32. kap.: Hvussu hevur Pax tað niðast á s. 32. Tosið eitt sindur um Amandu.

33. kap.: Tosið um, hvat tað var, tey veruliga gjørdu fyri at støðga bilunum.

34. kap.: Samanberið fyrsta reglubrot á s. 103 við fyrsta reglubrot á s. 15.

35. kap.: s. 105 *Tað er tílíkt, sum mammur gera, tá ið onkur hevur mist eitt barn. I guess. Royna at halda fast í sínum egna*. Hvat meinar Fríða við?

36. kap.: Hvat ímynda tit tykkum, at Fríða hevði sagt, um hon talaði til jarðarferðina hjá Miriam?

39. kap.: Tosið um staraflokkin. Hvat man hann ímynda? Tosið um mannin uttan fyri løgtingshúsið og boðskapin í taluni hjá Fríðu.

40. kap.: Tosið um taluna hjá Miriam.

Tá ið tit hava lisið

Greining og tulking

1. Tíð. Nær fer søgan fram? Hvussu long tíð gongur frá tí, at søgan byrjar, til hon endar?
2. Stað. Hvar eru vit stødd? Lýsið støðini.
3. Hvør er høvuðspersónur? Eru fleiri høvuðspersónar?
4. Aðrir persónar. Hvørjir persónar, umframt Fríðu, Miriam, Steffan og Pax, eru við í søguni? Veljið nakrar burturúr og lýsið teir.
5. Hvørji evni verða viðgjørd?

   At leggja til merkis:

   - Vinalag
   - Familjulív
   - Átrúnaður
   - Umhvørvi
   - Seksualitetur
   - Dálking
   - Veðurlagsbroytingar

©Nám

6. Hvussu er skaldsøgan bygd upp? Er hon í tíðarrøð ella loypir hon í tíð? Vísið á dømi.
7. Greiðið frá sjónarhorninum. Er tað tað sama alla tíðina ella skiftir tað? Vísið á dømi.
8. Hvussu er málið í bókini? Er bókin løtt at lesa? Eru nógv trupul orð? Vísið á fleiri dømi um ungdómsmál.
9. Hví man Marjun hava skrivað bókina? Hvør er boðskapurin? Kunnu vit læra nakað av bókini?

Aðrar uppgávur

- Er samsvar millum permu, heiti og innihald?
- Finn tað petti í bókini, sum tær dámar best. Les upp fyri flokkinum. Sig kanska frá, hví tær dámar júst hetta pettið.
- Skrivið loggbók.
- Skrivið bókaummæli líknandi teimum í bókini.
- Lurtið eftir broti úr Summartímanum 18.08.2020, kvf.fo (frá 22. min).
- Lurtið eftir poddvarpinum, sum liggur á snar.fo

©Nám

Tá ið tit hava lisið

Her eru nøkur hugskot afturat, sum tit kunnu arbeiða við.

- Greiðið frá ella tosið um, hvussu Fríða og Miriam broytast gjøgnum søguna. Sum barn er Fríða tann bangna og varna, men í endanum av søguni er hon øðrvísi. Miriam er tann framfúsna og djarva, men likamliga er hon ikki so væl fyri.

Hugskot til CL venjing.

- Vel líka nógv smá petti úr allari skaldsøguni, sum tað eru næmingar. Deil út og lat næmingarnar ganga runt millum hvør annan og lesa sítt brot. Tá ið allir hava lisið, skulu teir stilla seg á rað eftir, hvussu teir halda raðfylgjan er. Tá ið teir eru samdir um raðfylgjuna lesa allir sítt brot, og á henda hátt fáa næmingarnir eina stutta aftursøgn.
- Næmingarnir skulu í bólkar at tosa um persónarnar. Hvør bólkur fær ein persón. Næmingarnir fáa 5 post-it seðlar í part. Teir skulu skriva eitt lýsingarorð um persónin á hvønn seðil og skiftast um at leggja niður. Næmingarnir tosa saman um lýsingina.
- Næmingarnir kunnu hvør sær brúka hetta til at gera sína egnu persónslýsing.

Hugskot til tvørgreinaligt arbeiði, t.d. við samfelagsfrøði og lívfrøði.

- Arbeiðið við dálking, jørðini, veðurlagsbroytingum og umhvørvi.
- Dálking og umhvørvi: hvat kann eg gera, familjan, skúlin, ítróttarfeløg, politikkarar, bygdin/býurin, landið, heimurin.
- Kunnið tykkum um veðurlagsverkføll, Fridays for Future og Gretu Thunberg.

©Nám